Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Skúlastjóri í Venjingarskúlanum (endurlýsing)

**Ert tú ein góður leiðari, sum hevur visjónir innan fólkaskúlan?**
**Vilt tú standa á odda og menna ein fólkaskúla í høvuðsstaðnum?**

Skúlastjórin seinastu 11 árini fer frá vegna aldur, og tí sóknast Mentamálaráðið, eftir dugnaligum, ágrýtnum og eldhugaðum skúlastjóra til Venjingarskúlan at byrja sum skjótast.

Venjingarskúlin er tvey sporaður fólkaskúli frá 1. - 10. flokk. Skúlastjórin er dagligur leiðari skúlans og hevur undir ábyrgd skúlamyndugleikanna bæði fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans. Hann setir og loysir úr starvi lærarar og varaskúlastjóra, hann stýrir og býtir arbeiðið millum teirra, sum starvast í skúlanum, og hann tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum.

Venjingarskúlin arbeiðir miðvíst við at menna innskúlingina, at næmingarnir menna síni evni at arbeiða og hugsa sjálvstøðugt, at einstaki næmingurin fær umstøður at menna síni skapandi og praktisku evni, og at gott samstarv er millum skúla og heim. Eisini er ætlanin frá komandi skúlaári at skipa Venjingarskúlan í sjálvstýrandi toymi.

**Høvuðsuppgávur skúlastjórans eru at:**
- Standa á odda fyri framhaldandi menning á námsfrøðiliga og fyrisitingarliga økinum í skúlanum.
- At fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans.
- At skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd.
- Fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Harumframt vænta vit, at skúlastjórin:**
- Hevur hug og hegni til at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti skapar trivnað og mennir lærarar, næmingar og skúlan sum heild.
- Er visjoner/ur, hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og taka av teimum avbjóðingum sum liggja fyri framman.
- Hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlanin verður sett í verk.
- Er sjónligur í leiðarastarvinum, og at tú í hesum sambandi dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.

**Setanar- og lønartreytir**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving, góð evni at leiða og kunnleika til fólkaskúlaøkið.

Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Venjingarskúlanum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokki 36.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin kr. 34.760,31. Harumframt verður veitt ein viðbót, sum er kr. 1.700,00. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so at tann, sum settur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skúlastjórin hevur ávísa undirvísingarskyldu, sum verður ásett eftir galdandi reglum.

**Vit bjóða:**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligar menning í starvinum og fyri samstarvi við hinar skúlaleiðararnar í kommununi. Skúlin hevur eisini tætt samstarv við læraraskúlan bæði undirvísingarliga og hølisliga.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. mars 2007 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt varðir Mentamálaráðið av uppgávum viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
Í **Venjingarskúlanum** eru 452 næmingar í 1. – 10. fl., og 40 lærarar starvast í skúlanum. Skúlin húsast í trimum bygningum. 1. og 2. fl. halda til í Ytra Skúla við landavegin, 10. fl. er í Heimara Skúla í Fr. Petersens gøtu, og 3. – 9. fl. eru í Skúlanum á Stórheyggi.



# Kunngerð
## Um broyting av Almennu Byggisamtyktini fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at býráðið á fundi 22/02-2007 hevur samtykt at gera broytingar í Almennu byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu.

Broytingin umfatar IV Kapittul 1. gr. 3. stk., sum ljóðar soleiðis:

**1. gr. Útstykkingar og støðd á grundstykkjum.**

1. **Byggivaldið** kann seta sum treyt, at útstykking einans verður loyvd, um hon hóskar saman við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri náttúrliga avmarkað øki.

2. **Nýtsla av ognum.** Á ognum til vanlig sethúsaøki má ikki vera nakað slag av virki, sum við royki, deymi, gangi, við útsjónd, sýni ella á annan hátt kann vera teimum til ónáðir, sum uttanum búgva.

3. ***Grundstykkir til vanlig sethús, ið standa fyri seg, mugu ikki verða útstykkjað smærri enn 500 m², og grundstykkir til tvíhús, raðhús o.t. smærri enn 300 m² fyri hvørji sethús sær.***

4. **Verandi grundstykkir** smærri enn 300 m² kunnu bara í serstøkum førum verða nýtt at byggja sethús á.

Skal broytast til:

3. **Grundstykkir til vanlig sethús, ið standa fyri seg, mugu ikki verða útstykkjað smærri enn 500 m², og grundstykkir til tvíhús, raðhús o.t. smærri enn 300 m² fyri hvørji sethús sær. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil**

Broytingarnar eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 5. mars til og við 26. mars 2007

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 7. juni 2007

***Saltangará, tann 2. mars 2007***
***Runavíkar býráð***



Runavíkar Býráð



# Jóansøkan 2007

Feløg og einstaklingar, ið ynskja at hava tiltøk á Jóansøku á Tvøroyri 22. – 24. juni 2007, skulu boða frá til Kunningarstovuna á Tvøroyri tlf. 372480 ella sout-inf@post.olivant.fo, innan 31. mai 2007.

***Jóansøkunevndin***

1892 TB

***Tvøroyrar Bóltfelag***





# Kunngerð

Tórshavnar Musikkskúli hevur broytt upplatingartíðirnar.

Upp- og afturlatingartíðir:
Mánadag - fríggjadag frá kl. 11.00 - 16.00.

Telefon: 30 24 70 · Fax: 30 24 71
Teldupostur: musikkskulin@torshavn.fo

**Tórshavnar kommuna**



# Frá Eysturoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur verður í Arbeiðsmannafelagshúsinum í Leirvík mánakvøldið 5. mars kl. 19.

Kl. 20 verður fundur undir heitinum »Flokkurin møtir veljarunum«. Við á fundunum verða ting- og landsstýrisumboð floksins. Nýggir limir kunnu tekna seg.

***Eysturoyar Javnaðarfelag***